

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Sløkkiliðsfólk

Til sløkkiliðsstøðina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir sløkkiliðsmanni.

Høvuðsarbeiðsøki er í Tórshavn.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg við átekning til vinnuligan fólkaflutning. Tann starvssetti skal, um hann/hon ikki hevur fyrstahjálparprógv og prógv frá góðkendum sløkkiliðsskúla, taka hesi innan eitt ár.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsmannafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 16. mai 2008 kl. 12.00. Merkið umsóknina „Sløkkiliðsfólk".

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, ella Hans Dávid Hansen, varasløkkiliðsstjóra, á telefon 30 21 00.

## Feriuavloysarar til Tjarnargarð

Søkt verður eftir summarferiuavloysarum til Tjarnargarð í juni, juli og august 2008.
Talan er um avloysarar fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

Lesandi til heilsuútbúgvingar annars eru eisini vælkomin at søkja.

Eisini verður søkt eftir tímaløntum avloysarum til køksarbeiði. Køksarbeiðið fevnir bæði um kvøld og vikuskifti, so skúlaungdómur er vælkomin at søkja.

**Løn og setanartreytir**
eru sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Tórshavnar kommuna, Postboks 32, 110 Tórshavn í seinasta lagi fríggjadagin 30. mai 2008.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hensiu Einarsson, leiðara, ella Helenu Poulsen, varaleiðara, telefon 30 20 75.

## Feriuavloysarar til Ellis- og umlættingarheimið

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum, heilsuhjálparum og hjálparfólki sum feriuavloysarar í tíðarskeiðnum 1. juli til 31. aug 2008.

**Løn og setanartreytir**
eru sambært sáttmála millum kommunala arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera hjá Tórshavnar kommuna, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 30. mai 2008.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara, á telefon 31 73 39 ella 21 73 39 .

## Pedagogur til Býlingshúsið á Norðasta Horni

Søkt verður eftir einum pedagogi til vøggustovuna at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 1. juni 2008 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Óla Midjord, stovnsleiðara, telefon 21 09 06.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera hjá Býlingshúsinum á Norðasta Horni, Granagøta 5, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 19. mai 2008.

## Pedagogar til Dagstovnin Kurl@

Søkt verður eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu at arbeiða 32 tímar um vikuna at byrja 1.juni 2008 ella eftir nærri avtalu.

Tveimum pedagogum, ein til vøggustovu og ein til barnagarðsstovu, at arbeiða 32 tímar um vikuna at byrja 1. august 2008 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ann Jacobsen, stovnsleiðara, á telefon 35 35 00.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera hjá Dagstovninum Kurl@, Sundsvegur 3, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 19. mai 2008.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna